torir at stilla upp, og um hon torir at fara vestur á Eiði á valfund saman við øllum monnunum.

- Eg eri vorðin greið yvir, at á uppstillingarfundum verður ikki tosað so nógv um politik, og onkrum briksli skalt tú eisini roknað við, kanska eitthvørt abbi tín gjørdi fyri 70 árum síðan ella líknandi. Jú, saman við monnunum tori eg, sjálvt um eg ikki veit eitt vet um húkaveiðuna á Munkagrunninum ella vatnorkuútbyggingina hjá SEV í løtuni.

- Men eg má so eisini viðganga, at eg eri eg eitt sindur bangin fyri kvinnunum. Hugsa tær, tú stillar upp, leggur alt í at føra ein góðan valdyst. So kemur 21. januar, tú skalt út um dyrnar og hevur bara fingið 8 atkvøður. Mammasta, tað er pínligt, hóast eg veit, at tað er púra vanligt, ikki at fáa tað nógva fyrstu ferð. Tey gomlu og kendu á listanum slúka tað mesta. Men allíkavæl. Tá havi eg ikki so góðan hug at møta kvinnunum. Hvat hugsa tær um meg? Nú havi eg ordiliga dummað meg, her er ongin vegur aftur, tað nyttar hvørki at hugsa um deiligu Bridget ella Nynne, her er bara ein lóg sum sigur, "tú skalt ikki halda teg vera nakað serligt!"

- Tað er ikki lætt at taka avgerð um at stilla upp, men eg síggi stóra týdningin í, at politiska leiðslan arbeiðir fyri hesum, vilja javnt kynsbýti á listunum, bjóða nýggjum valevnum eitt skeið, har tú lærir at trína fram og tosa, o.s.fr. Men eg haldi ikki, at allir flokkar gera sítt ítasta fyri at fáa kvinnurnar við. Tak Fólkaflokkin sum dømi. Rúna Sivertsen fór úr flokkinum, tí tað ikki var pláss fyri henni. Álvaratos, tað eru so ikki kvinnurnar, ið standa og trokast har. Ein útvarpsmaður spurdi eftir uppstillingini hjá teimum í Norðoyggjum og fekk at vita, at tað vóru Anfinn Kallsberg, Jógvan við Keldu og ein triði maður á listanum. Eg hugsaði við mær sjálvari, at tað var løgið - bara 3 menn á listanum!



*Suðuroyarkvinnur hava stóran trupulleika við fjarstøðu. Flestu menninir, sum koma inn á ting, verða búgvandi her suðuri. Hugsi ikki, at ein kvinna hevði gjørt tað sama, haldi, at hon hevði flutt til Havnar. Og tá eg so síggi uppmøtingina hjá nøkrum av monnunum, skilji eg væl, at tað ber til at búgva her suðuri, men eg kann vissa tykkum um, at kvinnur, ið avgera at fara upp í politik, sanniliga eisini ætla sær at vera har*

Sosialurin

## Torført at upplýsa

Anna tosar um upplýsing, um týdningin, at vit, sum borgarir, kenna ábyrgdina av, at vera opin fyri og heinta okkum upplýsingar um viðkomandi samfelagsligir spurningar. Á henda hátt verða vit eisini betur før fyri at seta spurnartekin við og leggja okkum út í ymisk viðurskifti.

– Eg hoyri t.d. ofta frá fólki, at tey halda upplýsingina um fullveldi vera ov vánaliga, at fólk vita ov lítið um ætlanir, og hvat flokkurin stendur fyri. Her er nýggja heimasíðan eitt gott dømi um, hvussu flokkurin velur at gera politisku ætlanirnar fyri framtíðina sjónligar, so allir borgarir, á lættasta hátt, kunnu finna upplýsing, seta spurningar og samskifta við valevnini.

- Tað er sera torført at upplýsa fólk, men tá flokkurin var í samgongu, var spurningurin um fullveldi nógv á breddanum. Tað vóru kunningarferðir kring landið bæði við hvítu og svørtu bók, ein rúgva av útvarps- og sjónvarpssendingum settu spurnartekin við fullveldi, bløðini høvdu ikki so lítið av fullveldistilfari o.s.fr. Men um ein ikki legði í at koma á kunningarfundir, og ei heldur vildi hoyra ella lesa um spurningin, dugi eg væl at síggja, at einum vantar upplýsing, sigur Anna.

- Og apropos heimasíðu og nýggja branding, so trongir Suðuroyggin til eina nýggja branding, ongantíð ov skjótt. Vit mugu stríðast fyri eini sameining, fólk skulu taka lut og seta spurnartekin við, og fleiri kvinnur skulu blanda seg uppí politisku avgerðirnar og samfelagsviðurskiftini sum heild, tá verða vit fleiri, ið gerast nøgd, sigur Anna Brattaberg Samulsen.